## Starvsfólk til tøknideildina á Kall

**Vilt tú nýta tíni tøkniligu og analytisku evni í eini spennandi og skjótt vaksandi fyritøku, so bjóðar Kall tær vælkomnum á tøknideild sína.**

Við starvinum fært tú rætta løn, eins og vit geva tær sera góðar møguleikar fyri sjálvsmenning. Tað týdningarmesta fyri okkum er nevniliga ikki, at tú dugir alt frá fyrsta degi, men at tú hevur gott næmi og tøkniligan og analytiskan sans.

### Starvsøkið

Starvið kann vera rættiliga fjølbroytt, men ein týðandi partur er at røkja tøkniliga støðið undir roknskaparhaldi okkara. Tú fert t.d. at arbeiða við avrokningarskipanum sum Oracle, PostgreSQL, Bercut og Navision, tú fert at avgreiða og menna hagtals-rapportir (SQL-fyrispurningar), fyrireika dátugrundarlag til roknskapin og at betra um arbeiðsgongdir okkara.

### Útbúgving og eginleikar

Tað er sjálvandi ein fyrimunur, um tú ert t.d. teldustøðingur, datanomur, verkfrøðingur ella HA'ari, men hevur tú fingið tín lærdóm av egnum royndum, so ert tú hjartaliga vælkomin at søkja – tí vit vilja fyrst og fremst hava fólk við røttu evnunum.

Tað er eisini sera umráðandi, at tú hevur góðan hug at læra, ert fleksibul, dugir at samstarva og hevur áhuga fyri at betra um viðkomandi arbeiðsgongdir.



### Umsóknir

Hevur tú hug at søkja starvið, send so eitt teldubræv við avritum av viðkomandi skjølum til Hans Poulsen á Kall, hp@kall.fo. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú eisini vælkomin at ringja til Hans á 502072.

Umsóknarfreistin er 18. apríl klokkan 12:00.

### Um Kall

Kall kom á marknaðin í apríl 2001 og hevur síðan ment seg til ein virknan leikara í fjarskiftismenningini í Føroyum. Vit eru nú 35 fólk og selja fyri um 100 mió. kr. árliga. Kall er partur av samtaki, sum er skrásett á partabrævamarknaðinum OMX.

kall
20 20 20

SENDISTOVAN

almannastovan
www.almannastovan.fo



## SLÓÐIN - BÚSTOVNUR FYRI UNG SØKIR EFTIR NÁMSFRØÐINGUM

Dámar tær at gera mun fyri menniskju, sum hava havt tað trupult?

Dámar tær at starvast í einum umhvørvi, sum er merkt av einum gerandisdegi við nógvum óvæntaðum avbjóðingum, og sum tí krevur gott og tætt samstarv bæði við starvsfelagar, foreldur og ung?

So er tað tær, vit leita eftir.

Slóðin er bústovnur í Havn fyri ung við trupulleikum, normeraður til fimm ung 13-18 ár. Í løtuni starvast, umframt leiðara, 6 starvsfólk á stovninum í dag-, kvøld-, og vikuskiftisvaktum. Tvey størv skulu setast frá 1. juni, ella skjótast til ber, og sóknast vit tí eftir námsfrøðingum ella øðrum við viðkomandi námsfrøðiligari útbúgving og førleika.

Vit vænta av tær, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og ung. Eisini vænta vit, at tú møtir teim ungu og familjum teirra við viðurkenning og virðing, at tú ert fleksibul, og megnar, at tú ikki altíð veitst, hvørjum avbjóðingum, tú verður møttur av í gerandisdegnum, at tú torir at siga tína meining og at fara í holt við ósemjur, og at tú ert opin fyri fakligari menning. Tað er ein fyrimunur um tú hevur koyrikort og dugir væl at formulera teg skrivliga og munnliga. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir á hesum øki, praktiskt og fakliga.

Størvini eru flokkað sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag og verða lønt samsvarandi.

Nærri fáast at vita við at venda sær til Rúna Gaardlykke, leiðara, á telefon 315030 ella 285031.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til: Almannastovuna, Smyrilsveg 20, Postrúm 3096, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 21. apríl 2008.

Gerið so væl at merkja brævbjálvan: "umsókn Slóðin".

KREA

